**Tíðindabræv 14B/2013 – Rakstur – Eyka**

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

November, 2013

## STCW A-VI/6: VENJING Í VERND (ISPS) FYRI MANNING VIÐ VERNDARUPPGÁVUM – *Skiftisreglur til 1. januar 2014*

Víst verður til tíðindabræv 14/2013 – rakstur.

Sjófólk, ið hava havt verndaruppgávur umborð, og sum "eru farin í tænastu á sjónum áðrenn hetta krav verður sett í gildi", kunnu sambært A-VI/6, liði **9.1** og liði **9.2** leggja fram prógv um, at tey lúka krøvunum:

.1 approved seagoing service as shipboard personnel, for a period of at least six months in total during the preceding three years; or

.2 having performed security functions considered to be equivalent to the seagoing service required in paragraph 5.1;

Í slíkum førum eru niðanfyri standandi fyriskipanir settar í gildi:

**Føroysk sjófólk**

Fyri føroysk sjófólk umborð á einum og hvørjum skipi, tað veri seg føroyskt ella útlendskt skip, skal umsókn um prógv sendast til annað hvørt

- Sjónám, Postsmoga 20, FO-700 Klaksvík, tel. +298 665888, t-postur sjonam@sjonam.fo),
- Vinnuháskúlin, Postsmoga 104, 100 Tórshavn, tel. +298 350250, t-postur info@vh.fo) *ella*
- Navit S/pf, Postsmoga 225, 110 Tórshavn, tel. +298 508200 t-postur info@navit.fo

Saman við umsóknini skal prógv leggjast hjá, at sjófólkið lýkur kravinum til siglingartíð, umframt prógv um, at tænastan hevur verið umborð á skipi undir ISPS-kotuni.

**Sjófólk úr øðrum londum**

Fyri sjófólk úr øðrum londum umborð á føroyskum skipum undir FAS, hevur avvarðandi rakstrarfelag fingið myndugleika at útvega prógv grundað á somu omanfyri standandi treytir og í samsvari við leiðbeiningar frá sjóvinnumyndugleika í heimlandi felagsins, ella í samsvari við krøv í heimlandi sjómansins, eru serstøk krøv haðan.

Í hesum hava Føroyar valt sama leist, sum fleiri onnur lond, t.d. Svøríki og Danmark. Hjálagt fylgir frymil fyri prógvið.

Hjálagt: Frymil

--- 000 ---